# Jagstra piratkort í Føroyum

**Í hesum døgum eru fólk frá danska samtakinum STOP í Føroyum, har tey leita eftir teimum, ið selja piratkort, ið eru ólóglig kort til móttøku av útlendskum sjónvarpsrásum**

PIRATKORT
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað er eingin loyna, at nógvir føroyingar nýta tey sonevndu piratkortini til tess at síggja útlendskar sjónvarpsrásir. Hesi piratkort eru kort, ið fólk hava keypt frá privatfólki, sum hava ólógligani hava gjørt hesi kort. Piratkortini eru væl bíligari enn tey lógligu kortini, ið einans fáast til keyps frá góðkendum forhandlarum hjá útlendsku veitarunum.




*Mánamorgunin kom hesin bilurin hjá STOP til Føroya við Norrønu. Bilurin verður nýttur í jagstranini eftir piratkortum í Føroyum.*
*mynd: Jens Kr. Vang*

## Nógv at fara eftir

Í Danmark hava størstu veitararnir av gjaldsrásum, Canal Digital og Viasat, í felag sett á stovn samtakið STOP, sum hevur til endamál at finna fram til tey fólk, ið bæði selja og nýta áðurnevndu piratkort. Kunningarstjórin hjá Viasat, ið hevur rásirnar TV3, 3+, Viasat Sport og aðrar, Niels Jørgen Langkilde, váttar, at fólk hjá STOP í løtuni eru í Føroyum og royna at fáa fatur á teimum, ið fremja áðurnevndu lógarbrot.

– Tað er rætt, at vit í løtuni hava fólk í Føroyum, og eg kann siga so mikið sum, at vit hava ógvuliga nógv og heit spor at ganga eftir, sigur Niels Jørgen Langkilde. Tó sigur kunningarstjórin hjá Viasat, at Føroyar einki serdømi er í so máta, tí tað tykist ikki sum um, at piratkortini eru meiri vanlig her enn í grannalondunum, sigur hann.

Niels Jørgen Langkilde sigur, at STOP hevur tvey endamál við vitjanini í Føroyum. Umframt at jagstra tey fólk, ið selja og nýta piratkort, er samtakið eisini á vitjan hjá teimum, ið selja lóglig kort og útgerð til móttøku av rásunum hjá Canal Digital og Viasat. Hetta verður gjørt millum annað við tí fyri eyga, at tosast kann um, hvussu tann tekniski parturin við móttøku av signalinum frá Canal Digital og Viasat riggar í Føroyum, sigur Niels Jørgen Langkilde.

## Stórur trupulleiki

Tað eru ikki smávegis upphæddir, ið fyritøkurnar aftan fyri STOP, missa orsaka av piratkortunum. Niels Jørgen Langkilde sigur, at talan er um risa milliónaupphæddir, sum Canal Digital og Viasat ikki fáa hendur á, tí at fólk velja at keypa piratkort. Sum dømi nevnir hann, at størsti fongurin hjá STOP í fjør. Tá var ein dani tikin og skuldsettur fyri at hava selt ikki færri enn 2,7 milliónir piratkort til fólk ymsastaðnis í Europa. Havandi í huga at tey lógligu kortini vanliga kosta nakrar túsund krónur, er lætt at rokna út, at hesin danin hevur selt piratkort fyri óhugnaliga nógvar pengar samanlagt.

Kunningarstjórin hjá Viasat vísir eisini á, at í Danmark eru nógv dømir um, at fólk, ið hava fingist við piratkort eru komin rættuliga illa fyri. Til dømis nevnir hann, at tað seinnu árini hevur víst seg, at nógvir skipaðir brotsmenn eru farnir at selja piratkort. Fólk, ið hava keypt einaferð frá hesum monnum, verða síðani hótt til at blíva við at keypa, tí annars fer okkurt ódámligt at henda teimum, greiðir Niels Jørgen Langkilde frá. – Tað vísir seg eisini, at í fleiri av grannalondum okkara eru rokkarar farnir undir at selja piratkort, og fólk eru komin heilt illa fyri av hesum, sigur kunningarstjórin hjá Viasat.

## Nýggj skipan skal steðga trupulleikanum

Í eini roynd at steðga trupulleikanum við piratkortunum hava fyritøkurnar aftan fyri samtakið STOP nú brúkt eina stóra millióna-upphædd upp á at fáa eina nýggja koduskipan, ið skal forða fyri, at tað ber til hjá privatfólki at framleiða nógv umrøddu piratkortini.

Niels Jørgen Langkilde sigur seg bæði vóna og vænta, at hetta fer at verða við til, at piratkortini fara í søgubókina. – Hendan koduskipanin er so mikið framkomin, at eg illa dugi at ímynda mær, at tað fer at bera til at »knekka« koduna, sigur Niels Jørgen Langkilde at enda.

EVNISDAGUR

Byggiharrasamtak Føroya og Føroya Handverksmeistarafelag skipa fyri

**Evnisdegi um útbjóðing**

mikudagin 15. september kl. 8 - 18 á Hotel Føroyum
fyri byggiharrum, arbeiðstakarum, ráðgevum, advokatum og øðrum áhugaðum.

Skal verandi lisitatiónslóg endurskoðast?
Hvat inniheldur nýggja danska lógin “Tilbudsindhentningsloven”?
Hvørjir fyrimunir og vansar eru við henni?
Framløgur og kjak um praktiskar royndir v.m.

**Fyrilestrahaldarar:**
Oyvindur Brimnes, Byggiharrasamtak Føroya
Hans Lykke Hansen, Viltoft & Høberg-Petersen
Peter Andersen, Håndværksrådet
Mette Slott, DR-byen, Partneringsudvalget
Chico Sandbæk, Kuben, Rammebetingelsesudvalget
Peter Dethlefsen, Konkurrencestyrelsen

Kostnaður fyri hvønn: kr. 2.000,00 íroknað døgurða v.m.

Tilmelding í seinasta lagi mánadagin, tann 13. september 2004 hjá:

Byggiharrasamtak Føroya, c/o Landsverk, Telefon: 311 333
Teldupostur: kristian@lv.fo, Konto nr. 164.322.5 í Føroya Banka
ella á www.industry.fo. Konto nr. 156.933.5 í Føroya Banka,

Tilmeldingin er endaliga skrásett, tá goldið er.

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

ítróttur
Nr. 171 • hósdagur • 9. september 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Andrew nærkast HB

**Nógv bendir á, at Andrew av Fløtum komandi ár aftur verður at síggja í reyðu og svørtu strípunum hjá HB**

LEIKARASKIFTI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað er einki dulsmál, at nú Rógvi Jacobsen frá komandi kappingarár fer at leika við íslendska KR, missur álopið hjá HB ein sera týðandi leikara. Men maður kemur í mans stað, verður ofta sagt, og hetta tykist so sanniliga eisini verða galdandi í HB. Herfyri kunngjørdi havnarfelagið, at tað hevði gjørt tvey-ára sáttmála við Tór-Ingar Akselsen, og nú ljóðar fyri vist, at landsliðsleikarin Andrew av Fløtum eisini verður at síggja á HB-liðnum komandi kappingarár.



*Nógv bendir nú á, at Andrew av Fløtum aftur verður at síggja í reyðu og svørtu strípunum hjá HB komandi kappingarár.*
*savnsmynd*

## Tosa javnan saman

Stjórin í Havnar Fótbóltur, ið er partafelagið aftan fyri 1. lið hjá HB, Steinfinn Mittelstein, sigur, at teir sjálvsagt fegnir vilja hava Andrew aftur, men enn eru ongar ítøkiligar samráðingar millum HB og Andrew. Hann sigur tó, at felagið javnan tosar við Andrew, sum hevur sáttmála við danska felagið hjá sær, Fremad Amager, fram til á nýggárinum.

Tað hevur ljóðað fyri vist, at Andrew ætlar sær aftur til Føroyar, tá ið sáttmáli hansara við Fremad Amager gongur út á nýggjárinum, men Steinfinn Mittelstein er ikki heilt samdur í hesum. Hann sigur, at um Andrew fær bjóðað ein nýggjan og góðan sáttmála frá Fremad Amager ella onkrum øðrum donskum felagi, er ikki óhugsandi, at vandamikli framherjin verður verandi á flatlondum. Tó sigur stjórin í Havnar Fótbóltur, at kemur Andrew aftur til Føroya, so væntar hann heilt sikkurt, at Andrew aftur fer at spæla í HB.

Andrew á Fløtum hevur spælt 163 dystir í HB-troyggjuni, og hann hevur skorað ikki færri enn 84 mál fyri havnarfelagið.

# Ingi fer ikki til Rangers

**Í gjár fekk Ingi Højsted endaliga at vita, at hann ikki fær nakran sáttmála við skotska stórfelagnum Glasgow Rangers**

FÓTBÓLTSÚTISETI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Eftir at Ingi Højsted og enska felagið Arsenal fyrr í ár komu ásamt um at enda teirra samstarv, hevur ungi havnarmaðurin verið í sambandi við fleiri feløg, sum hava áhuga í evnaríka miðvallaranum. Millum annað var skotska stórfelagið Glasgow Rangers sera áhugað í Inga, og tí var hann boðsendur til royndarvenjingar.

## Áhugin er stórur

Hóast Glasgow Rangers eftir fyrstu vitjanina hjá Inga enn einaferð sendi boð eftir føroyska miðvallaranum, og Ingi tískil fyri aðru ferð royndarvandi í felagnum, spurdist einki burturúr. Í gjár fekk Ingi Højsted at vita, at hann ongan sáttmála fær frá Glasgow Rangers í hesum umfari.

Umboðsmaðurin hjá Inga Højsted, Jákup í Stórustovu, sigur, at hóast einku spurdist burturúr venjingunum hjá Inga í Glasgow Rangers, so eru vónirnar góðar um, at tað fer at eydnast unga manninum at fáa ein sáttmála við okkurt annað felag. Jákup í Stórustovu greiðir frá, at Ingi longu í komandi viku aftur fer at vitja okkurt felag, har hann skal royndarvenja, og fleiri onnur feløg liggja framvið, sigur hann.

Tað hevur ljóðað, at tvey av feløgunum, sum hava sýnt Inga áhuga, skulu verða hollendska Ajax Amsterdam og enska Bolton. Serliga skal Bolton hava sýnt Inga stóran áhuga, og vælvitandi keldur vilja verða við, at tað er hagar, at leiðin hjá Inga gongur í næstu viku. Jákup í Stórustovu vil tó hvørki vátta ella avsanna hesi tíðindi. Tað eydnaðist okkum tíverri ikki at fáa fatur á høvuðspersóninum sjálvum.

*Tað eydnaðist ikki í hesum umfarinum hjá Inga Højsted at fáa sáttmála við skotska stórfelagið Glasgow Rangers, men fleiri onnur feløg eru áhugaði í unga føroyska miðvallaranum*
*savnsmynd*




# FSF sett talent-menningar-bólk

Fótbóltssamband Føroya hevur sett ein talentmenningarbólk at gera eitt upprit um, hvussu føroyingar á besta hátt kunnu menna teir yngru spælararnar, so at hesir í størri mun vera klárir at taka við á a-landsliðnum, tá teirra tíð er komin.

– Vit skulu tora at fara eftir teimum bestu spælarunum og menna hesar, soleiðis at toppurin í føroyskum fótbólti gerst betur, sigur Bjarki Mohr, sum formaður í kappingarnevndini hjá FSF.

– Ætlanin er at býta Føroyar upp í eini seks øki, har teir bestu spælararnir skulu venja saman reguliga. – Tað eru ikki teir, sum eru 19 ella 20 ára gamlir, sum vit skulu eftir. Tað eru spælarar heilt niður í 12 ára aldur, og tí fer hetta at krevja eina hugburðsbroyting úti í feløgunum, sigur Bjarki Mohr.

Í talent-menningarbólkinum sita Jógvan Martin Olsen, Johan Nielsen, Mourits Foldbo, Álvur Hansen umframt nøkur umboð fyri FSF.

**hkm**